**Jørgen Niclasen**
**landsstýrismaður**

**Svar upp á fyrispurning nr. 82/2014 eftir § 52a í tingskipanini frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, um avtalu við Felagið føroyskir peningastovnar um KT-skipanir, NemID, Mínboks o.a.**

**Spurningur 1**
Hvat er ítøkiliga hent síðani fráboðaðu avtaluna við Felagið føroyskir peningastovnar um KT-skipanir í Føroyum frameftir og talgilda undirskrift, og hvussu verður avtalan útint í verki?

**Svar:**
Í løtuni verður endaligur arbeiðsleistur við tíðarætlan, manning av verkætlan og kostnaði gjørdur liðugur. Vit fara eisini at taka atlit til íkast til arbeiðsetning, sum kom frá rættarnevndini í sambandi við tingmál 134/2014. Vit stremba eftir, at niðurstøður eru klárar í heyst.

**Spurningur 2**
Hvat er avtalan viðvíkjandi NemID, ið fólk enn verða beinleiðis biðin at tekna seg til á netbankanum – og hvussu nógv hava skrásett seg í NemID ávikavist fyri og eftir fráboðanina?

**Spurningur 3**
Hví velja peningastovnarnir nú at vraka ta føroysku skipanina Mínboks til talgilt samskifti við føroyskar brúkarar?

**Spurningur 4**
Hvussu samsvarar hendan avgerðin við fráboðanina um, at "*Felagið Føroyskir Peningastovnar taka lut í arbeiðinum hjá landsstýrinum at talgilda Føroyar. Talgildingin hevur til endamáls at nútímansgera vælferðina og tænasturnar hjá føroyingum og skal viðvirka til at skapa kappingarføri, vøkstur og framleidni.*"?

**Spurningur 5**
Hvussu skapar avgerðin hjá peningastovnunum um framvegis at biðja fólk brúka NemID og at taka burtur møguleikan at brúka føroysku skipanina Mínboks "kappingarføri, vøkstur og framleidni" fyri føroyska samfelagið?

**Svar uppá spurningarnar 2 – 5**
Avtala við peningarstovnarnar var:
" *at innritan til netbankan verður óbroytt. Tað merkir, at kravið um NemID verður slept, og brúkarar kunnu halda fram at brúka netbankan sum áður. Tey, sum ynskja tað, kunnu sjálvboðin velja NemId ístaðin fyri verandi innritan. Tá ið Føroyar hava valt eina felags føroyska talgildað undirskrift í sambandi við arbeiðið hjá landsstýrinum at talgilda Føroyar, verður hendan eisini brúkt av peningastovnunum. Ein føroysk talgild undirskrift væntast liðug um 2 ár*"

Sambært peningastovnunum eru áleið 50% av brúkarum av netbankanum, sum hava valt at teknað seg til NemId og uml. 14% av teimum aftaná avtaluna.

Staðfestast kann, at peningastovnarnir, sum avtalað, hava slept kravinum um skáseting í NemID sum eina treyt fyri at kunna nýta netbankarnar, og sum nevnt, hava teir í avtaluni bundið seg til at brúka felags talgildu undirskriftina fyri Føroyar, tá hendan er klár.

Einki var avtalað um Mínboks. Peningarstovnarnir hava verið við frá byrjan við Mínboks og tí tykist tað løgið, at teir bakka út nú.

Avtalað var eisini, at Felagið Føroyskir Peningastovnar taka lut í arbeiðinum hjá landsstýrinum at talgilda Føroyar.

Talgildingin hevur til endamáls at nútímansgera vælferðina og tænasturnar hjá føroyingum og skal  vera við til at skapa kappingarføri, vøkstur og framleiðsluorku,  umframt at tryggja munandi sparingar og effektiviseringar í almenna geiranum. Talgildingin hevur við sær, at borgarar og virki samskifta talgilt við almenna geiran, at fyrisitingarligar tænastur hjá tí almenna eru tøkar á netinum, og at veitingar og mannagongdir í almennu fyrisitingini eru talgildar.

Landsstýrismaðurin í Vinnumálum og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hava í felag tikið stig til verkætlanina at gera strategi fyri ”Talgildu Føroyar”.  Heildarætlanin er skipað í fýra høvuðstættum, hvør við sínum verkætlanarbólki:

- Talgildan samleika
- Talgildar tænastur, t.e. trygt og einfalt samskifti millum borgarar, vinnu og almennar tænastur
- KT-arkitektur og grundskráir, tvs. meginreglur fyri, hvussu vit skipa føroyska KT-undirstøðukervið
- Skynsom skipan av KT-rakstri og nýtslu í almenna geiranum

Í arbeiðsbólkunum eru serfrøðingar frá landi og kommunum umframt uttanhýsis ráðgevarar, har sum neyðugi kunnleikin ikki var tøkur í almennu stovnunum.
Stýrisbólkurin fyri verkætlanini er mannaður við aðalstjóranum í Vinnumálaráðnum (form.), aðalstjoranum í fíggjarmálaráðnum, løgmannstjóranum, stjóranum á gjaldstovuni og umboðum fyri Komunufelagið og Vinnuhúsið.
Ein ávegis strategi verður løgd fram 25. juni. Í hesari verður lýst, hvørji átøk eru neyðug at fremja komandi árini fyri at røkka málinum um eitt fult talgilt samfelag. Í heyst heldur arbeiðið við at undirbyggja, greina og ítøkiliggera átøkini fram, og endaliga tilmælið til heildarætlan verður handað í desember.

**Spurningur 7**
Hvat ger landsstýrið ítøkiliga til tess at tryggja, at føroyskar KT-skipanir kunnu mennast í Føroyum, og at gjørligt verður at taka tær skipanir heimaftur, sum eru fluttar av landinum?

**Svar:**
Politikkurin hjá landsstýrinum er at nýta føroyska arbeiðsmegi og føroyskar KT- fyritøkur til menning og rakstur av almennum KT- skipanum. Á henda hátt er landsstýrið við til at styrkja føroyska KT- umhvørvi og harvið eisini førleikar til at taka KT-virksemi heim til Føroyar. Hetta er eisini partur av arbeiðinum at talgilda Føroyar.

**Spurningur 8**
Hvørji eru sett at gera ta óheftu kanningina, ið nevnd verður í fráboðanini, har lýsast skulu viðurskifti í sambandi við møguliga heimtøku av KT-skipanunum, og hvør setir og velur fólk til kanningina?

**Svar:**
Sí svar til spurning 1.

Argir, 12. mai 2015

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður